**UTTAN ÚR HEIMI**

## Fakfeløgini ímóti Blair

Bretsku fakfeløgini høvdu trongar tíðir, tá Margareth Thatcher var forsætisráðharri í sjeytiárunum, og í veruleikanum tók tað teimum tjúgu ár at koma fyri seg aftur.

Tað fær núverandi bretska stjórnini eisini at kenna. Í síðstu viku vóru vóru nógv arbeiðsfólk í flutningskervinum í verkfalli, postmenninir hava boðað frá, at teir fara í verkfall, og tað sama hava sløkkiliðsmenninir gjørt.

Flestu fakfeløgini eru misnøgd við lønina, men tað er ikki tað einasta. Tey eru eisini misnøgd við, at tann sosialdemokratiska stjórnin ætlar at einskilja fleiri almennar fyritøkur, samstundis sum hon ætlar at fremja ymsar nýskipanir innan tað almenna.

Í einari blaðgrein í síðstu viku royndi Tony Blair, forsætisráðharri at verja politikkin hjá stjórnini. Hann skrivaði m. a., at stjórnin ger stórar íløgur í tí almenna virkseminum og legði afturat, at tílíkar íløgur vanliga hava nýskipanir við sær.

Margareth Thatcher fekk rættiliga stóra undirtøku millum bretar, tá hon skerdi verkfalsrættin og valdið hjá fakfeløgunum. Men síðani er eitt nýtt og meiri víðgongt ættarlið av fakfelagsleiðarunum komið framat, og teir teir krevja, at ein sosialdemokratisk stjórn skal reka ein meiri vinarliga sinnaðan fakfelagspolitikk.

## Jødar mótmæltu

Umleið 400 fólk, tey flestu danskir jødar, mótmæltu sunnudagin ísraelsku framferðini ímóti palestinska fólkinum. Mótmælið var uttan fyri ísraelsku sendistovuna í Keypmannahavn.

Frammanundan høvdu fyrireikararnir sett eina fráboðan í danska blaðið Politiken og ísraelska blaðið Haaretz, har teir staðfestu, at einasti vegur fram ímóti friði í Miðeystri er eitt sjálvstøðugt palestinskt ríki.

Tað vóru ikki allir jødar í Danmark, sum vóru líka fegnir um fráboðanina og mótmælistiltakið sunnudagin. Fyrrverandi fólkatingsmaðurin, Arne Melchior, sum er jødi, fanst at fyrireikarunum, og fleiri týðandi jødar í Danmark vóru ikki at síggja millum mótmælisfólkini, skriva donsk bløð.

## Eingin samgonga

Samráðingarnar um stjórnarskipan í Svøríki ganga illa.

Sunnudagin havnaðu bæði Umhvørvisflokkurin og Vinstriflokkurin einum uppskoti frá Gøran Persson, forsætisráðharra, men flokkarnir søgdu seg tó vera til reiðar at fara aftur til samráðingarborðið. Umhvørvisflokkurin heldur fast um, at flokkurin skal hava sess í sjálvari stjórnini, men tað vil Gøran Persson ikki góðtaka.

Tað kann hugsast, at Gøran Persson fer at skipa eina sosialdemokratiska minnilutastjórn uttan stuðul frá hinum báðum flokkunum, men hetta stig kann gerast vandamikið, tí bæði Umhvørvisflokkurin og Vinstriflokkurin hava sagt, at teir eru til reiðar at atkvøða fyri einum uppskoti um misálit, verður tað lagt fram. Tí fer Persson helst at royna eina ferð afturat.

# Her druknaðu 970 fólk



Ferjan "Le Joola" hevði loyvi at sigla við 550 ferðafólkum afturat manningini, sum taldi 55. Men myndugleikarnir í Senegal siga, at 1034 fólk vóru við ferjuni, tá hon sakk úti fyri gambisku strondini. Tey fyrstu tíðindini søgdu, at 797 fólk vóru umborð á ferjuni, men seinni máttu myndugleikarnir viðganga, at teir høvdu gloymt, at 185 ferðafólk vóru komin umborð í einari havn, sum ferjan hevði verið í á vegnum norðureftir, og at teir eisini høvdu gloymt at talt manningina við.

Bara 64 fólk sluppu frá vanlukkuni á lívi. Millum teirra, sum druknaðu, var ein 25 ára gomul norsk kvinna.

# Kríggið verður stutt

**Týskir hernaðarserfrøðingar vænta, at eitt møguligt kríggj millum USA og Irak verður stutt**

IRAK-KREPPAN

*Árni Joensen*

Týskland fer ikki at senda hermenn til Irak at berjast saman við amerikanarunum, hevur Gerhard Schrøder, kanslari sagt, men tað forðar ikki týskum hernaðarserfrøðingum í at gera sínar metingar av einum møguligum kríggi.

Á einari ráðstevnu í Berlin um vikuskiftið søgdu týsku serfrøðingarnir, at Saddam Hussein hevur munandi færri kemisk og biologisk vápn nú, enn hann hevði fyri nøkrum árum síðani, men teir ivaðust hinvegin ikki í, at irakski forsetin fer at geva herinum boð um at nýta hesi vápn, verður landið álopið. Amerikanararnir hava sagt seg vóna, at nøgvir yvirmenn í irakska herinum fara at taka til rýmingar, og tað vænta teir týsku hernaðarserfrøðingarnir eisini.

Men einki bendir á, at metingarnar hjá serfrøðingunum hava nakra ávirkan á týsku stjórnina. Joschka Fischer, uttanríkisráðharri hevur sagt NATO-aðalskrivaranum, Robertson lordi, at Týskland stendur við avgerðina um, at týskir hermenn verða ikki sendir til Irak.

Kortini er ymiskt, sum bendir á, at viðurskiftini millum Týskland og USA eru batnað nakað síðani týska valið. Tá Týskland í síðstu viku fekk sæti í trygdarráðnum hjá ST, var USA millum tey fyrstu londini at ynskja Berlin tillukku við valinum, og í hesum mánaðinum fer Joschka Fischer til Washington at vitja. Tað ljóðar eisini, at týskir diplomatar royna at útvega Gerhardi Schrøder, kanslara eina innbjóðing úr Hvítu Húsunum, og at uttanríkispolitiski samskiparin hjá ES, Javier Solana, hevur boðið sær til at virka sum semingsmaður.

# Hóttir við at fara frá

**Ísraelski uttanríkisráðharrin, Shimon Peres, hóttir við at fara úr stjórnini**

MIÐEYSTUR

*Árni Joensen*

Sunnudagin varð avdúkað, at tað prutlar undir lokinum í ísraelsku stjórnini.

Hetta kom fram, tá Shimon Peres, uttanríkisráðharri alment fanst at stjórnini, samstundis sum hann fýltist á, at hann verður hildin uttan fyri uttanríkispolitiskar avgerðir.

- Stjórnini hjá Sharon vantar bæði mið og mál. Sleppi eg ikki at taka lut í teimum avgerðum, sum skulu takast, kann eg ikki halda fram sum uttanríkisráðharri, segði ein týðiliga misnøgdur Peres.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Shimon Peres hóttir við at leggja frá sær, og hetta er minni enn so fyrstu ferð, at hann hevur funnist at Ariel Sharon, forsætisráðharra. Men tey, sum standa uttanríkisráðharranum nær, siga, at hesaferð er álvari í orðum hansara.

Beinleiðis orsøkin til misnøgdina sigst vera, at Sharon í síðstu viku sendi ein av sínum næstu ráðgevum til Washington at tosa við amerikansku leiðararnar um støðuna í Ramallah, har ísraelski herurin hevði kringsett støðina hjá Yasser Arafat. Hetta var eitt beinleiðis uttanríkismál, men Shimon Peres visti einki um fundin. Ikki fyrr enn tríggjar dagar seinni frætti hann tað.

Hetta vil Shimon Peres ikki lata sær lynda, siga tey, sum standa honum nær.




Fyrstur við tí seinasta

5 ferðir um vikuna


Sosialurin
Dansurin gekk so lystiliga í Havn
síða 4
Nr. 96 • týsdagur • 22. mai 2001 • 75. árgangur • Kr. 10,00
www.sosialurin.fo
Arbeiðsleysur:
Jákup er líðugur í Herfølge
Ítróttur, s. 13-28

Ja!

Sjálvandi vil eg halda Sosialin, fyri einans 400,- kr. ársfjóðringin og sparið 380,- í mun til leysasøluprísin.

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ______

Bústaður: ______

Postnr.: ______

Bygd/býur: ______

Telefon nr: ______

Undirskrift: ______

y
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn